Føroya
SOSIAL-DEMOKRATUR

Blaðstjóri
VILLI SØRENSEN
telf. 672
Postbox 76

Prent:
A. ØSTER

Fiskimanna-fundur í Havn

Seinasta týsdag var stórur fiskimannafundur hildin í Tórshöll í Havn. Bjóðaðir vóru arbeiðarar og blaðmenn. Húsið var stúgvandi fult og röðurnar hjá báðum fiskimannafelagsformonnunum Erlendi og Danbjörg væl umtóktar.

Erlendur helt drúgva röðu og greiddi gjölla frá umstöðum fiskimanna tey seinastu árini. Síðani kom hann inná sáttmálarnar og greiddi frá tingingunum, ið fram vóru farnar og hvat hvör parturin í sínum lagi kravdi. Fiskimenn, segði hann, vóru fullkomuliga samdir um, ikki at slaka. Teirra umstöður vóru nú so vánaligar, at nakað mátti gerast, og her var fyrsta sáttmálarnar123456 123456 12345634 loysnin, at teir fingu teir gomlu bruttosáttmálarnar aftur. Útgerðarmenn klagaðu um, at teir ikki hövdu ráð at gera skipini út, og hövdu tí uppskot um at hava nettosáttmálarnar, men ein mun verri fyri fiskimenn enn frammanundan. Fiskimannafelögini fataðu sjálvandi umstöður útgerðarmanna og hövdu sagt seg til reiðar at taka upp tingingar við reiðararnar við tí í hyggju at minka um útreiðslurnar hjá fiskivinnuni sum heild, men eisini hetta var ímóti verunligu áhugamálum útgerðarmanna.

Danbjørg manar til dyggari samanhald

Eisini Danbjörg, formaður Suðuroyar fiskimannafelags ,helt eina megnarröðu. Hann kundi taka undir við öllum tí, sum Erlendur hevði sagt. Röða hansara snúði seg tí eina mest um tað, ið hent var á lögtingi hesi seinastu árini, um lönjavning, forskot, Föroya Fiskasölu, fiskaprísir o. s. fr. Hann vísti á, hvussu torfört tað hevði verið at fingið nakað framt til frama fyri fiskimenn, men tingið hevði kortini í vissum förum givið eftir fyri rættvísiskrövum fiskimanna. Víðari segði Danbjörg:

Tað ,ið okkum fram um alt törvar er betri samanhald. Tað kann einki nytta, hvat eg og Erlendur gera. Einsamallir orka vit einki. Fyrst og fremst mugu vit hava dyggari samhald millum fiskimenn, men eisini hetta er ov lítið, vit mugu fáa allar útróðrarmenn við, tí tað kann einki nytta, at vit gera verkfall, tá ið aðrir fara við skipunum at rógva út. Seinastu árini havi eg arbeitt fyri einari samgongu millum fiskimannafelögini og arbeiðarafelögini. Standa vit allir saman, kunnu vit vinna eitthvört verkfall uppá eina viku, í staðin fyri at tað nú ganga mánaðir. Eg vil tí taka uppaftur tað, ið eg so ofta havi sagt: Arbeiðarar á sjógv og landi fylkist.

Báðir röðararnir vórðu væl fagnaðir, og eingin ivi er um, at fiskimenn í hesum dögum standa öksl móti öksl og vilja halda áfram við stríðnum, til sigurin er vunnin.

Rættingar.

Í seinasta blað var komið at standa í grein Danbjörgar um Gulak Jacobsen, at Gulakkur fekk eina kúlu gjögnum ökslina, tá ið flogfar skeyt eftir Smirli. Hetta var ikki rætt. Kúlan fór tætt omanfyri ökslina á honum.

Í greinini »Fiskimenn« var komið at standa »Yvirklassin í Krossi«. Hetta skuldi vera yvirklassin í *Tinganesi*.



Havnar Arbeiðsmannafelag

hevur fund í Losjuni mikukvöldið 11. í h. kl. 7,30.

Fundarevni:
Innliman í De samvirkende Fagforbund.

Nevndin.

FISKISKAPUR Í VÁGI

	desember 1952 kg	—	dagar	januar 1953 kg	—	dagar
Venus	12.850	—	10	25.800	—	13
Saturn	11.493	—	9	28.909	—	14
Uranus	9.352	—	8	17.336	—	10
Leif	26.771	—	12	34.596	—	13
Sjúrður	19.302	—	12	34.216	—	13
Fagriklettur	20.203	—	7	38.985	—	11
Saksaberg	21.771	—	11	27.522	—	13
City of Norvich	30.880	—	11	55.219	—	17
Johanna	26.259	—	12	44.178	—	14
Havgásin	22.581	—	8	21.131	—	9
Tryggvi	5.532	—	2	5.709	—	4
Nólsoyar Páll	11.846	—	10			
Ormurin	18.692	—	10			
Royndin	12.936	—	7			
Agnes Lovisa	24.989	—	10			
Sjófrúgvin	17.849	—	11	23.633	—	11
Jonna	7.729	—	8	15.868	—	10
Norðfarið				7.624	—	4
W. G. Marshall				2.780	—	3

TÓRSHAVNAR LÍKKISTUGOYMSLA
hevur telefon nr. 706
ymiskir prísir
JACOB C. JOENSEN
snikkari

Klakksvík . . .

Framh. av 1. síðu.

»Marie Dan« hósdagin: »Guðrun«, Atlantsfarið, Sigurfarið og Sreymoy.

Polo kom úr Keypmannahavn hósdagin við stykkjagóðsi og timbri til P.f Kjölbro.

Sjúrðarberg og *Dragaberg* væntast báðir úr Onglandi komandi viku.

Tjaldrið, ið fór hiðani mánadagin, lossaði 170 t. av stykkjagóðsi. Tók eitt sindur av fiski niður við.

Gamla Nevið Reyða, motorbátur, ið P.f Kjölbro átti fyri nökrum árum síðani og seinni varð seldur til Nólsoyar, hava Sámal Sivertsen o. aðrir Klakksvíkskingar keypt aftur. Báturin verður nú riggaður til útróður.

Eyðbjörg, ið hevur staðið á beding her í vetur, stendur framvegis. Hon fær stórumvöling.

Karmal Geil hevði sangkonsert íAtlantis Bio hóskvöldið.

Sjónleikurin »Lögmannsdótturin á Steig« verður væntandi framfördur í næstu viku.

Grækarismessuhaldið verður sunnudagin 15. í h. kl. 15. Songur, hondbóltur og röðuhald.

Fleiri enskir trolarar vóru inni í illveðrinum, men teir lata illa at fiskiskapi.

Arbeiði.

Fleiri menn starvast nú við fiskapakking, og væl av lossuarbeiðið hevur verið nú nakrar dagar. Við kajuna arbeiða nakrir menn. Nökur hús standa í gerð og sjómannsheimið er nú rættuliga farið at næla, men kommunan hevur ongar menn í arbeiði nú. Nakrir menn fáast við velting (ikki böndur). *s.*

Fiskanøgd og søluúrslit í Bretlandi í februar mánað 1953

Norðstjörnan	387	cwt	£ 1401
Dragasund, bátf.	655	»	» 2866
Havgásin, bátf.	820	kitt	» 3107
Grunningur bátf.	979	cwt	» 2951
Westward Ho	563	»	» 1810
Akranes	232	»	» 757
Gulldrangur, bf.	717	»	» 2211
Brimnes	319	»	» 706
Norðlýsið	318	»	» 920
Maritana, bátf.	809	kitt	» 3890
Dragaberg, bf.	2110	»	» 7584
Dragasund, bátf.	857	cwt	» 2763
S. Egholm, báf.	319	»	» 957
Hoyvík, bátf.	484	»	» 1084
Saksaberg, bátf.	664	kitt	» 2987
Útegg, bátf.	389	cwt	» 1156

februar 1953:	595.477,6 kg 718.470,52 kr.
februar 1952:	1.515.783,1 kg 1.275.245,43 kr.
februar 1951:	366.000,0 kg 311.000,00 kr.
februar 1950:	37.000,0 kg 48.000,00 kr.